# Mølby settur

**Hóskvøldið varð tað endaliga staðfest, at Jan Mølby verður nýggjur venjari hjá Hull City, og sum skilst á lagnum fer formaðurin ikki at verða sparin, tá liðið skal styrkjast í summar**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Tað er nú nakað fráliðið, síðani Brian Little varð koyrdur úr venjarasessinum hjá Hull City í Onglandi.

Seinastu vikurnar hava Julian og liðfelagar hansara í bretska havnarbýnum so bíða í spenningi eftir, hvør nýggi venjarin skuldi verða. Heitasta navnið hevur alla tíðina verið Jan Mølby. Fyrrverandi danski landsliðsleikarin, sum seinnu árini hevur roynt seg sum venjara í lægru ensku deildunum. Seinastu tvey árini hevur hetta verið gjørt í Kidderminster, og hóast teir á stigatalvuni eru hægri enn Hull, so ivaðist Mølby ikki, tá hann hevði møguleikan.

- Hull hevur potentiali til at gerast eitt veruliga stórt felag, er Mølby millum annað siteraður fyri at siga í donsku og ensku miðlunum.

Í hesum liggur helst, at hann sær munandi størri møguleikar í Hull og nógvu pengunum hjá Adam Pearson, enn hann ger í heldur trongu korunum í Kidderminster. Kidderminster vann seg í fjør upp úr sonevndu Conference League, og nógv eru av teirri fatan, at felagið er ov lítið til at røkka stórt longri enn tað, sum teir hava nátt í dag.

## Fær pening

Í Hull eru tey sum vera man fegin um, at tað hevur eydnast teimum at fáa navnframa danan til venjara.

- Eg vildi seta ein venjara, sum á sama hátt sum eg sjálvur og viðhaldsfólk okkara krevur at vinna. Jan Mølby kennir støðið í deildini, og hann veit hvat skal til, um tað skal eydnast okkum at vinna uppeftir, segði formaðurin í Hull millum annað, tá avtalan varð undirskrivað.

Og tað tykist, sum um nýggi venjarin eisini fer at fáa hampuliga væl av peningi, so hann kann styrkja sær um hópin. Pearson vísti á, at nýggi venjarin nú hevur møguleikan at læra hópin at kenna, soleiðis at hann í summarsteðginum kann fáa neyðuga styrkin til vega.

Hvussu hetta fer at ávirka støðuna hjá Julian Johnsson, sum higartil hevur verið fastur fúsur á miðvøllinum, er enn ikki greitt, men onkur ábending um hetta verður helst at síggja komandi dystirnar.

## Kappingin um Løgmanssteypið

Bólkur 1

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 3 | 2 | 1 | 0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 2 VB | 3 | 2 | 0 | 1 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 3 NSÍ | 2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 4 Sumba | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 7 | -6 | 0 |

Bólkur 2

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 3 | 2 | 1 | 0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 2 FSV | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 3 EB/Str. | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 5 | -1 | 3 |
| 4 TB | 3 | 1 | 0 | 2 | 3 | 6 | -3 | 3 |

Bólkur 3

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 3 | 2 | 1 | 0 | 8 | 3 | 5 | 7 |
| 2 KÍ | 3 | 1 | 1 | 1 | 8 | 7 | 1 | 4 |
| 3 Skála | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 4 B68 | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 7 | -3 | 3 |

## Dystir um vikuskiftið

Kappingin um Løgmanssteypið

**Bólkur 1**
06.04 B36-Sumba
06.04 NSÍ-VB

**Bólkur 2**
06.04 GÍ-FS Vágar
06.04 EB/Streymur-TB

**Bólkur 3**
06.04 B68-HB
06.04 KÍ-Skála

# Hvar er bólturin?



Tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

Navn:
Bústaður:
Tlf:
Eg giti, at bólturin er í teigi:

Seðilin skal sendast til:
Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan "FCK"

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.

Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS







Í Sosialinum fríggjadagin 3. mai verður eitt stórt innlegg í blaðnum um bilar og alt, sum hevur við bilar at gera.

Hetta er eitt gott høvi hjá fyritøkum at lýsa um teirra virksemi innan bilavinnuna

Freistin at fáa eina lýsing við er 25. apríl
Tosi við Finnbjørg ella Anju

finnbjørg@sosialurin.fo · anja@sosialurin.fo

Sosialurin

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA